# rin burtur



*Claus Bech Jørgensen í eini roynd at flukta. Føroyingar komu til møguleikar, men tíverri vóru royndirnar ov lítið neyvar og ov lítið avgjørdar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

minka um munin, tá Rógvi longdi innkast, men sum ikki einaferð, so gleið hann á trupla undirlagnum, og so var eisini tann møguleikin burturi.

Spurningurin er so eisini, um ikki møguleikum fyri fleiri føroyskum stigum í hesi undankappingini er burturi nú. Bert ein dystur er eftir, men í kvælandi hitanum, sum helst er væntandi í Tel-Aviv, skal nokk ikki roknast við, at okkara fara at gera tær heilt stóru skreytirnar. Heldur ikki, hóast svørðurin tá helst verður betri egnaður til fótbóltsspæl, enn hann var á Tórsvølli mikukvøldið.

Og so skerst heldur ikki burtur, at tað neyvan er optiamlt hjá liðnum, tá ferðinin er, sum hon var hesaferð. At skula ferðast eina heila nátt, tá tú skalt spæla dyst tríggjar dagar seinni, er kanska ikki tað smartasta at gera. Her mátti tað verið munandi meira upplagt, at spælararnir lógu nátt eftir dystin í Fraklandi, og siðani ferðaðust heim sunnudagin.

Ikki tí vøllur ella ferðing skulu vera undanførslur. Men vit kenna okkara leiklut í altjóða høpi. Tað eru nakrar givnar fyritreytir, har vit vita, at hini eru frammanfyri. Ikki minst í spælaratilfeingi. Men tá tað kemur til fyrireikingar og standin á undirlendinum, er talan um lutir, sum vit hava fult tamarhald á. Og skulu vit hava nakran kjans at standa okkum, so er neyðugt, at teir lutir, har vit hava ávirkan, verða greiddir úr hondum so væl, sum tað á nakran hátt ber til.



*Við at seta Rógva sum target-man, royndu venjararnir at fáa nakað av tiltrongdari styrki í luftspælinum, sum var neyðugt á trupla vøllinum. Og tann parturin av ætlanini riggaði til fulnar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Kepp og turriklæði til Henrik



*Henrik var fegin um gávurnar, sum hann hevði fingið frá 12. manni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Henrik Larsen fekk undan dystinum mikukvøldið blómur og gávur frá bæði spælarum og áskoðarum

Hetta varð gjørt, nú talan var um seinasta heimadystin við stóra dananum sum venjara.

Eftir dystin segði Henrik, at hann sjálvandi var fegin um blómurnar og gávurnar, sum hann hevði fingið.

- Tað hevði eg ikki roknað við. Men hatta var veldugt av 12. manni.

*Og hvat var so í hasum posunum, sum tú fekk frá teimum?*

- Har var ymiskt, sum hoyrir einum áskoðara til. Keppur og turriklæði, og so eisini eitt lítið steyp, so tað var bara í lagi.

*So tað verður kanska sum áskoðari, at vit síggja teg aftur á Tórsvølli?*

- Tað veitst tú jú ongantíð, so tað kundi kanska verið, helt hann flennandi fyri.

**-mørk**

## FAKTA UM DYSTIN

**Føroyar-Ísrael 0-2 (0-2)**
**HM-undankappingardystur á Tórsvølli**
**2.240 áskoðarar**
0-1: Avi Nimny, 55.
0-2: Yanic Katan, 80.
**Dómarabólkur úr Hollandi:** Pieter Vink, Wilco Lobbert, Coen Droste, Kevin Blom
**Dómaraeygleiðari úr Danmark:** Jørn West Larsen
**FIFA-umboðsmaður úr Liktenstein:** Otto Biedermann
**Føroyar:** 1. Jákup Mikkelsen - 3. Mortan úr Hørg, 13. Óli Johannesen (liðf.), 5. Jón Rói Jacobsen, 2. Súni Olsen - 9. Jákup á Borg (17. Heðin á Lakjuni, 68.), 7. Fróði Benjaminsen, 14. Ingi Højsted (11. Andrew av Fløtum, 61.), 8. Claus Bech Jørgensen (12. Símun Samuelsen, 85.) - 7. Rógvi Jacobsen, 10. Christian Høgni Jacobsen
**GK:** Súni Olsen, 38.
**Á beinkinum uttan at koma inn:** 4. Atli Danielsen, 15. Pauli G. Hansen, 16. Jens Martin Knudsen, 18. Jónhard Frederiksberg
**Venjari**: Henrik Larsen
**Hjálparvenjari:** Jógvan Martin Olsen
**Ísrael:** 1. Nir Davidovitch - 2. Alon Harazi, 3. Tal Ben Haim, 4. Ariel Banado, 6. Adoram Keisi - 20. Yaniv Katan (14. Moshe Biton, 86.), 17. Abbas Swan, 10. Valeed Badeer, 8. Avi Nimny (liðf.) - 15. Yossi Benyoun, 7. Pini Balili (11. Idan Tal, 65.)
**GK:** Abbas Swan, 20.
**Á Beinkinum uttan at koma inn:** 5. Shimon Gershon, 18. Michael Zandberg, 19. Salim Toamo, 21. Klemi Saban, 22. Ohad Cohen
**Venjari:** Avraham Grant